# Bolton hóttir nú Everton

**Einki av fýra teimum fremstu liðunum spældu í Premier League hetta vikuskiftið vegna FA-Cup, men bardagin um 4. plássið heldur fram, og nú er tað Bolton, ið er tann nærmasti kappingarneytin hjá Everton í dystinum um Champions League pláss komandi kappingarár. Í botninum kempa fýra lið framvegis ein harðan dyst um at sleppa undan niðurflyting**

PREMIER LEAGUE
*Stefan í Skorini*
*stefan_skorini@hotmail.com*

Orsakað av hálvfinalunum í FA-Cup vórðu bert seks dystir leiktir í Premier League hetta vikuskiftið. Eyguni vórðu nú vend ímóti botnstríðnum og tí fjórða og seinasta Champions League plássinum.

Liverpool skuldi royna at halda dampinum uppi eftir bragdið ímóti Juventus mikukvøldið. Liverpool spældi seg tá ímóti øllum oddsum fyri fyrstu ferð í hálvfinaluna í Champions League. Men leygardagin kom grái gerandisdagurin aftur til Anfield, tá liðið ikki megnaði at fáa trý stig ímóti Tottenham, ið tískil koyrdi grús í maskinaríið hjá Liverpool.

Sviin Erik Edman legði Tottenham framum heilt tíðliga í dystinum, og hetta gjørdi ikki uppgávuna hjá teimum reyðu léttari. Beint fyri steðgin javnaði spaniólin Luiz Garcia, ið veruliga hevur víst sítt virði á Liverpool-liðnum seinastu tíðina.

Hetta gav heimaliðnum blóð á tonna til seinna hálvleiki, men bert tíggju minuttir eftir steðgin kom Tottenham aftur framum. Hesuferð við málið frá Robbie Keane. Nú skuldi Liverpool aftur stríðast í mótbrekku restina av dystinum.

Stutta løtu seinni fær Liverpool brotsspark, og tað skuldi Steven Gerrard, ið ikki spældi við í seinna dystinum ímóti Juventus, taka sær av, men hann sendi skotið framvið málinum. Tveir minuttir seinni fekk Liverpool tó útjavnandi málið, og tí stóð Sami Hyypia fyri.

Hóast Liverpool legði stórt trýst á Tottenham-málið ta seinastu løtuna eydnaðist ikki at fáa sigursmálið, og nú sær tað sera svart út hjá teimum reyðu úr Liverpool viðvíkjandi luttøku í Champions League komandi ár.

### Bolton leyp framum

Bolton gjørdi sær dælt av, at Liverpool snávaði á heimavølli, og leyp framum við einum sigri á Charlton. Venjarin Sam Allardyce hevur gjørt eitt framúrskarandi arbeiði í felagnum, eftir at liðið flutti uppaftur í Premier League fyri nøkrum árum síðani. Nú berjist liðið fyri luttøku í Champions League, og tað hevði eingin roknað við.

Jay-Jay Okocha legði Bolton framum sjey minuttir inn í dystin frá brotssparksblettinum. Miðskeiðis í fyrra umfari javnaði Francis Jeffers tó fyri heimaliðið, og 1-1 var eisini hálvleiksstøðan.

Tað er óivað lagnunnar speisemi, at tað júst gjørdist senegalesarin El-Hadji Diouf, ið skoraði sigursmálið fyri Bolton. Diouf er nevniliga útlæntur frá Liverpool til Bolton, og nú skorar hann málið, ið sendir Bolton framum Liverpool.

Diouf hevði ikki eydnuna við sær í Liverpool, og hann var eisini innblandaður í fleiri hendingar, ið høvdu við sær, at Liverpool vildi sleppa sær av við Diouf. Men nú hevur hann skorað átta mál fyri Bolton, og hann er toppskjútti hjá liðnum í ár. Tað má vera sparing eftir reyv hjá Liverpool, um Diouf nú fer at hjálpa Bolton til eitt pláss í Champions League.

Tað er tó enn Everton, ið liggur best fyri. Við einum dysti færri liggur liðið tvey stig frammanfyri Bolton og trý stig frammanfyri Liverpool.

### Norwich iðrar seg

Í botninum vóru fleiri sera avgerandi dystir hetta vikuskiftið. Bæði tey næstaftastu, Crystal Palace og Norwich, liðini møttust á Selhurst Park, og tað gjørdist ein málríkur dystur.

Crystal Palace legði seg á odda við máli frá Joonas Kolkka tíðliga í dystinum, men við tveimum málum frá Dean Ashton var Norwich frammanfyri í steðginum. Og tá Leon McKenzie skoraði til 3-1, trúðu tey flestu, at Norwich fór at ogna sær sigurin.

Men soleiðis skuldi ikki ganga. Crystal Palace bardi seg innaftur í dystin, og við málum frá Micheal Hughes og Andrew Johnson fekk heimaliðið ein kærkomnan javnleik. Hetta var møguliga tann avgerandi løtan hjá Norwich í hesum kappingarárinum, og møguleikarnir eru ikki góðir hjá botnliðnum. Síðsta vikuskiftið vunnu teir á Manchester United, og tað kundi tí verið líkt til, at teir nú settu endaspurtin inn, men tá tað ikki eydnast at verja eina 3-1 leiðslu røkist lítið fyri, at liðið fer at lívbjarga sær.

### Southampton misti trygga leiðslu

Southampton liggur framvegis undir niðurflytingarstrikuni eftir 3-2 tapið fyri Aston Villa á heimavølli. Hetta var ein sera dyggur smeitur fyri liðið frá suðurstrond Onglands, tí Southampton var nevnliga frammanfyri 2-0 í steðginum.

Teir báðir áleypararnir Peter Crouch og Kevin Phillips høvdu lagt heimaliðið framum 2-0 eftir bert einum korteri, og tað sá út til, at Southampton fór at fáa ein kærkomnan sigur.

Men so var ikki. Innanfyri tjúgu minuttir í seinna hálvleiki hevði Aston Villa vent einum 2-0 tapi til ein 3-2 sigur. Fyrst minkaði Charlton Cole um munin, áðrenn Nolberto Solano og Steven Davies løgdu gestirnar framum.

Southampton liggur tískil framvegis til niðurflyting, eitt stig aftanfyri West Bromwich Albion, ið hevur ein dyst til góðar.

Tað verður ein harður kampur ímillum Norwich, Crystal Palace, Southampton og West Bromwich Albion, men bert eitt teirra sleppur undan niðurflyting.

Aðrastaðni spældu Pourtsmouth og Birmingham ein málleysan javnleik, og Fulham og Manchester City leiktu eisini javnt 1-1.

### Úrslit, Premier League

**16. apríl**

| | |
|---|---|
| Charlton-Bolton | 1-2 |
| Crystal Palace-Norwich | 3-3 |
| Fulham-Manchester City | 1-1 |
| Liverpool-Tottenham | 2-2 |
| Southampton-Aston Villa | 2-3 |
| Birmingham-Portsmouth | 0-0 |

# Claus sá gult

**Coventry er framvegis omanfyri niðurflytingar strikuna, men vandin fyri at flyta niður er ikki burtur, tí fjarstøðan til strikuna er bara tvey stig**

ENGLAND 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Claus Bech Jørgensen tykist rættuliga at hava vunnið seg aftur, eftir at skaðin, sum hann fekk á Kypros í oktober, oyðilegði fyrra partin av kappingarárinum hjá honum.

Hesa ferð var hann millum teir fyrstu ellivu, tá ið Coventry hevði vitjan av Wolverhampton. Claus var á vøllinum, inntil tað restaði eitt korter. Tá varð hann skiftur út, kanska eisini ti at hann hevði tiltuskað sær eitt gult kort og harvið var í vanda fyri at verða rikin av vøllinum, um hann eina ferð aftur at hevði sæð gult.

Í Coventry kendu teir tað eftir dystarlok sum um teir høvdu vunnið eitt stig, meðan gestirnir iðraðu seg um, at teir høvdu tapt tvey stig. Coventry javnaði til 2-2 í síðstu løtu.

Fremsta liðið niðanfyri strikuna hevur 46 stig, meðan Coventry hevur 48 stig. Sostatt er Coventry framvegis í vanda fyri at flyta niður.



*Eftir stuttan skaðasteðg var Claus Bech Jørgensen aftur á liðnum hjá Coventry um vikuskiftið*

# Toppurin líkist sær sjálvum

**Trý tey ovastu fingu fult, og serliga varð lagt til merkis, at FCK megnaði at stríða seg til fulla úrtøku í Århus**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað gongur væl hjá FCK. Hesa ferð vóru teir í Århus, og tað eydnaðist at fáa fulla úrtøku. FCK vann 2-1, eftir at FCK í 1. hálvleiki hevði lagt seg á odda 2-0, áðrenn heimaliðið stutt undan hvíldini minkaði um munin.

Málskjúttar hjá FCK vóru Álvaro Santos og Hjalte Bo Nørregaard, sum enn eina ferð skoraði av brotsteigar markinum, og sum er toppskjútti hjá FCK. Hjalte var liðformaður, tí miðverjin og liðformaðurin, Bo Svensson, var skaddur. Í gjár varð gjørt ikki so lítið burturúr í Danmark, at tað framvegis er ógreitt, um Hjalte fer at halda fram í FCK ella ikki. Sáttmálaskeiðið verður runnið 30. juni, og miðvallarin krevur meiri í løn, enn teir í FCK vilja bjóða honum. Umboðsmaður hjá Hjalta Nørregaard er Ulrik le Fevre. Tað navnið komast tey við, sum minnast Vejle og Borrussia Mönchen Gladbach og danska landsliðið í seksti og sjeyti árunum.

Álvaro Santos setti hælin undir flatt skot eitt sindur úr vinstru frá Magne Hoseth. Eftir steðgin kom Zuma ikki á vøllin, tí hann var eitt sindur skaddur, og tá ið 2. hálvleikur var tíggju minuttir gamalur, loysti Peter Møller Álvaro Santos av.

FCK spælararnir vóru troyttir, eftir at teir høvdu brúkt tríggjar dagar mitt í vikuni upp á ferðina til Tróndheim og strævna uppgerð í Royalu kappingini ímóti Rosenborg. Tað var neyðugt at stríðast eyka, tá ið AGF hevði minkað um munin og í 2. hálvleiki fleiri ferðir var um reppið at fáa útjavnandi málið. Nógv varð tosað um AGF málið, sum Mortan Rasmussen skoraði við nevanum.

Trýstið á FCK var stórt undan ferðini til Århus, tí leygardagin hevði Brøndby loyst torføru uppgávuna til fulnar í Viborg. Har vunnu teir gulu og bláu 2-0, og harvið er greitt, at Viborg, sum er á fjórða plássinum, neyvan hevur nakran møguleika at vinna heiðursmerkir.

FCM er framvegis nummar trý. Teir vunnu 3-1 í Herfølge, sum er undir niðurflytingar strikuni saman við FCN. Í Farum megnaðu hvørki heimaliðið FCN ella OB at skjóta mál. Hvørki av hesum liðunum hevur síðani vetrarsteðgin megnað at vinna, og í OB krevja viðhaldsfólkini, at venjararnir báðir missa høvdið.

AaB og Esbjerg vóru partar av málleysum javnleiki leygardagin, og í Silkeborg vóru teir á heimaliðnum vónbrotnir, meðan gestirnir úr Randers vóru hjartans fegnir um 2-2. Tá ið tað var hálvleikt bendi alt á, at Silkeborg, sum var á odda 2-0, skuldi vinna øll stigini.